## Góð hugskot krevja búning



Mánakvøldið byrjaði fjórða skeiðið í íverksetan, sum Íverksetarahúsið í Klaksvík skipar fyri. Millum teir, ið hildu fyrilestur var Eyðbjørn Poulsen frá fyritøkuni 2improve. Hann vísti millum annað á, at ein íverksetari eigur ikki at vera bangin fyri at brúka tíð til búningina, og at gera sær ómak við virkisætlanini. Skeiðið var fullteknað (myndin), og heldur tað fram fýra tey næstu mánakvøldini. Annars skipar Íverksetarahúsið fyri inspirasjónsdøgum um vikuskiftið á Hotel Norð. Skeiðleiðari er David Madié, sum er stjóri og medstovnari av Startup Company í Keypmannahavn. **(sb.)**

## Heri prestur vitjar í Reykjavík

Hetta vikuskiftið fær sjómansheimið Ørkin forkunnuga vitjan, tá Heri Joensen, prestur í Havn kemur á vitjan. Heri hevur lisið gudfrøði í íslendska høvuðsstaðnum, og fer leygardagin og sunnudagin at luttaka við ymisk tiltøk. Byrjað verður leygarkvøldið kl. 8, tá ein kvøldvøka verður í Ørkini, har Heri fer at siga frá søgum og skemti, eins og hann fer at hava andaktina. Sunnudagin kl. 15 er føroysk gudstænasta í Háteigskirkju, har Heri somuleiðis fer at prædika. Aftaná gudstænastuna verður kaffi og hungalig samvera á sjómansheiminum. **(sb.)**

# Kvinnuhúsið vísir til KRIS

**Tørvur er á einum betri tilboðið til tey, sum hava verið kynsliga misnýtt. Hetta heldur Elin Reinert Planck, leiðari á Kvinnuhúsinum. Í dag vísa tey kvinnur víðari til KRIS ella sálarfrøðing, men hjálpin átti at verið betri skipað, heldur Elin Reinert Planck**

ÁGANGUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Kvinnuhúsið tekur ímóti og hjálpir kvinnum, sum flýggja undan harðligum monnum. Og tær kvinnur, sum koma til Kvinnuhúsið, hava onkuntíð kynsliga misnýtslu við sær í viðførinum.



*Elin Reinert Planck, leiðari í Kvinnuhúsinum, heldur ikki, at arbeiðið í móti kynsligum ágangi er gott nokk, sum er. Tað skuldi verið eitt stað, har skipað var fyri terapiskeiðum, og har sjálvhjálparbólkar kundu húsast, sigur hon*

*Savnsmynd*

- Kynsligur ágangur er ikki orsøkin til, at kvinnur søkja sær hjálp hjá okkum. Men tá tær fortelja sína søgu, kemur kynslig misnýtsla onkuntíð undan kavi, greiðir leiðarin á Kvinnuhúsinum, Elin Reinert Planck, frá.

Kvinnuhúsið hevur ikki nakað terapi tilboð til slíkar kvinnur, tær kunnu lurta og rúma, men hava kvinnurnar brúk fyri meira, verða tær vístar til KRIS ella sálarfrøðing. Men Elin Reinert Planck heldur, at trupulleikin við kynsligum ágangi er so stórur, at arbeiðið burdi verið betri skipað.

- Tað skuldi verið eitt stað, har skipað var fyri terapiskeiðum, og har sjálvhjálparbólkar kundu húsast. Sjálvhjálp hevur stóran týdning í samband við kynsligan ágang, tí tey raktu hava brúk fyri at hoyra at onnur hava verið í somu støðu, sigur Elin Reinert Planck.

Hon er púra samd við slagorðinum hjá KRIS, at kynslig misnýtsla skal tosast í hel.

Og bæði Kvinnuhúsið og Sjálvhjálpin kundi verið knýtt, at einum meira skipaðum arbeiðið í móti kynsligum ágangi, staðfestir Elin Reinert Planck.

# Ongar ætlanir um nýggja kreppumiðstøð

**Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, viðgongur, at arbeiðið ímóti kynsligum ágangi ikki hevur verið nóg gott. Men hann ynskir ikki at seta nýggja kreppumiðstøð á stovn, tí vit hava longu resursirnar, sigur hann**

ÁGANGUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Rósalind og Bárða hava gjørt øllum Føroyum eina stóra tænastu við opið at tosa um kynsligan ágang. Hetta sigur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm.

- Tað er ein fantastisk tænasta, sum tær gera. Ein stórur partur av fyribyrgingararbeiðnum liggur í at fáa ágangin fram í ljósi og læra børn at tað er rætt og gott at boða frá, tá tey verða misnýtt. Og tær báðar hava gjørt hetta lættari við at ganga undan og tosa opið, sigur Hans Pauli Strøm.

Vitanin skal út í samfelagið og út til børnini, soleiðis at øll vita, at kynsligur ágangur ikki skal góðtakast, og at tað er loyvt og gott at tosa um tað, tá onkur ger seg kynsliga inn á onkran, heldur landsstýrismaðurin.



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, heldur, at KRIS ger eitt gott arbeiði. Tað skal bara samskipast betri við aðrar stovnar og skipanir, sum vit longu hava*

*Savnsmynd*

### Nokk av stovnum

So er spurningurin, hvussu hetta arbeiðið skal fara fram. Hans Pauli Strøm sigur, at tær 200.000 krónurnar, sum KRIS fær, eru meir enn flestu aðrir lítlir felagsskapir fáa. Men hann heldur, at tey gera eitt gott arbeiði. Tað skal bara samskipast betri við aðrar stovnar og skipanir, sum vit longu hava, sigur hann.

- Vit hava Barnabatað, Kvinnuhúsið, Barnatænastuna og nýggja ráðgevandi toymi, Sjálvhjálpin. Allir hesir stovnar arbeiða partvís ímóti kynsligum ágangi, men fyri at styrkja hetta økið, eiga vit at fáa eina betri samskipan, heldur Hans Pauli Strøm.

Hann heldur ikki, at tað er rætt at skipa ein nýggjan stovn, sum bara arbeiðir ímóti kynsligum ágangi, men heldur brúka teir stovnar, sum longu eru.